**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 15. september 2015, kl. $8^{15}$.**
**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Hilbert Elisson, Jógvan Emil Nielsen, Malan Stórá, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Durita á Heygum tann 10. august 2015 boðað frá, at henni barst frá at møta á fundinum, tí hon er stødd uttanlands.
Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 14. september. Hann fekk ikki møtt á fundinum. Jógvan Emil Nielsen fekk fundarboð tann 14. august, og játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jógvani Emil Nielsen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 147**
Áheitan frá Pauli T. Petersen, borgarstjóra, á bygdaráðið um at gera frávík sambært § 6, stk. 2 í kommunustýrislógini, soleiðis at borgarstjórin í Vestmanna kommunu kann taka sæti í Løgtinginum.

Sambært grein 6, stk. 2 í kommunustýrislógini kann kommunustýrið loyva borgarstjóra at taka á seg beinleiðis fólkavalt starv, samstundis sum hann situr sum borgarstjóri við fullum setanarbrøki.

Hetta er eisini í tráð við stýrsiskipanarlógina § 8 sum sigur, at tá løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald størv. Hetta undantak er, sambært viðmerkingunum til lógina, kommunustrýrisstørv, sum hvíla á eitt fólkavalt mandat.

Pauli T. Petersen, borgarstjóri, fór av fundinum, tí hann metti seg vera ógegnigan at viðgera málið

**Viðv. 147**
Áheitanin var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 8.35.

Sign.:

Pauli T. Petersen John Zachariassen Hilbert Elisson Herit Magnussen

Jógvan Emil Nielsen Malan Stórá